# Á vitjan hjá jóla-manninum

## Jólamaðurin býr í fjøllunum. Tað eru flest øll samd um, men fyri nógv av heimsins børnum býr hann í finsku fjøllunum. Sosialurin hevur verið og vitjað jólamannin, ið býr á pólkringinum í Lapplandi







Tað er kalt og kavi. Risa kavamenn og stór kavaklødd jólatrøð standa uttanfyri smáttuna, har jólamaðurin býr.

Á hvørjum ári koma 300.000 fólk at vitja hann. Tey koma úr øllum heiminum, og onkrar dagar tekur hann ímóti heili 2.000 persónum.

Hendan dagin, vit eru á vitjan, eru ikki nógv fólk har. Ein vættur, ið eitur Timo, kemur og tekur ímóti okkum og spyr, um vit vilja hitta jólamannin. Timo er í nissuhúgvu, vaðmalsbuksum og reyðari troyggju. Hann dugir nógv ymisk mál, tí tað má man duga um man skal arbeiða fyri jólamannin.

Smáttan hjá jólamanninum er nýliga umbygd. Fyrr vóru gestirnir noyddir at standa úti í kulda og bíða eftir at sleppa inn til jólamannin. Nú er ein snotilig gongd gjørd, har eitt stórt hjól vísir, hvussu jólamaðurin steðgar tíðini, so hann kann l náa at bera jólagávur út til børn í øllum heiminum.

Tá vit frá Sosialinum koma inn til jólamannin, er hann í góðum hýri. Hann vísir okkum tekningar, hann hevur fingið frá børnum og spyr okkum, hvat vit ynskja okkum til jóla. Jólamaðurin sigur, at hann ofta er og vitjar sínar starvsfelagar í Føroyum og hinum Norðurlondunum.

Jólamaðurin fær sera nógvan post, og tí hevur hann sítt egna postkontór. Vættrar og nissur hjálpa til, tí øll tey 700.000 brøvini skulu eisini svarast.

– Nógv børn gloyma at skriva adressuna, og tá er heldur torført at senda teimum eitt svar, sigur ein av nissunum, ið situr og letur brøvini upp, sum jólamaðurin hevur fingið hendan dagin. Men øll, sum skriva adressuna, fáa eitt svar frá jólamanninum.

Brøvini hava ofta ikki rætta adressu. Á summum stendur bara "Jólamaður, Finland", men hóast tað so koma brøvini fram. Frímerki gloyma nógv eisini.

Býurin, ið liggur nærmast við bústaðin hjá jólamanninum, eitur Rovaniemi. Tað er størsti býurin í finska Lapplandi, og har er nógv jólaligt at gera og fáa. Ferðafólkini, ið koma at vitja jólamannin, vilja eisini síggja vøkru náttúruna í Lapplandi og fara útferðir við reinsdjórum ella sletuhundum.

Eitt stað, ið bjóðar seg fram við slíkum útferðum, er Joulukka, ið liggur eitt sindur uttanfyri Rovaniemi. Har eru tað álvarnir, sum ráða. "Joulukka" merkir jólaligt á finskum, og tað má man sanniliga siga, at hetta hugnaliga staðið er.

Eini 40 álvar arbeiða í Joulukka og eru í beinleiðis sambandi við jólamannin.

Ein av teimum kallar seg "Álvan Josefina". Hon bjóðar okkum vælkomnum og spyr, um vit hava hug at læra okkum at gerast álvar. Josefina hevur spíska nøs og oyru. Hennara fræknur minna um tær hjá Pippi, og hon er í reyðum kjóla.

Eitt av tí týdningarmesta at duga hjá einum álvi er at tritla friðarliga, lúra gjøgnum vindeygu og vera fitt móti øllum - bæði fólki og djórum.

Álvan Josefina heldur, at vit verða góðkend sum álvar aftaná ein undirvísingartíma. Nú vil hon vísa okkum radarstøðina, har tey ansa eftir, so reinsdjórini hjá jólamanninum ikki bresta saman við flogførini, ið koma til Rovaniemi.

Tað er avbera stuttligt at vitja hesa ævintýraverðina í Lapplandi. Um tú roynir at tosa við fólk um, at jólamaðurin faktiskt ikki er til ... eru tey skjót at svara aftur "Jú, her hjá okkum er jólamaðurin verðuligur". Og satt at siga, so er hann jú verðuligur júst her. Fyri tey 60.000 fólkini, ið búgva i Rovaniemi, er jólamaðurin ein av grundunum til, at tey hava arbeiði, gott samband við umheimin og at samfelagið blómar við fleiri og fleiri íbúgvum.

### Hvar býr jólamaðurin?

Tað eru nógvar ymiskar meiningar um hetta. Í Danmark halda tey, at hann býr í Grønlandi, í Svøríki gita tey, at hann býr í Tomteland í Mora, í Finnlandi vita tey jú, at hann býr í Rovaniemi og í USA meina nógv at hann býr á Norðpólinum.

### Hvør hevur latið jólamannin í?

Nógv meina, at tað var í eini Coca-Cola lýsing í 1930-talinum, at jólamaðurin fyrstu ferð varð latin í reyð klæðir.